# Reglugerð fyri § 10a og 10b í lógini um Búnaðargrunn

## 1. Partur
## Umsóknin

**§ 1.** Fyri at tryggja sær møguleikan fyri stuðli eftir § 10a er umráðandi at lata Búnaðargrunninum (*víðari skrivað grunnurin*) umsókn, áðrenn farið verður undir ætlaðu íløguna. Umsóknin skal (leinkja til pdf fílu/oyðublað) innihalda viðkomandi upplýsingar og skjalprógv skulu leggjast við:

a) Krónutalið søkt verður um.

b) Lýsing av hvat stuðulin skal nýtast til.

c) Greinað íløguætlan har møguligur § 10a-stuðul er innroknaður, kostnaðarætlan/tilboð, rakstrarætlan og tíðarætlan.

d) Er umsóknin uppá meira enn 500.000 kr og til annað enn til velting og vegagerð, kann grunnurin krevja, at hon verður gjøgnumgingin av sakkønum á økinum, óheftur av handilsáhugamálum. 1)

e) Innanhýsis roknskapir fyri seinastu 2 undanfarnu árini. Um eingin roknskapur er tøkur, so frágreiðing um ætlaða virksemið.

f) Viðkomandi tekningar og/ella kort.

g) Leigusáttmáli fyri búnaðarjørð, sum festið nýtir/skal nýta, og ikki eigur. Er talan um almenna jørð, skal sáttmálin vera góðkendur av Búnaðarstovuni.

h) Seinasta tøka ársyvirlitið frá húsdýraskrásetingini. 2)

*Stk. 2* Grunnurin skilar sær rætt til sjálvur at biðja um aðrar viðkomandi upplýsingar, nærri ella nýggja nágreining av upplýsingum og/ella skjalprógv av viðkomandi framsetingum.

*1) t.d. serfrøðingar hjá SEGES í Danmark ella Norsk Landbruksrådgivning.*

*2) Tað merkir, at grunnurin krevur av mjólkneytabóndunum, sum eru kundar hjá grunninum, at teir skráseta síni neyt í skipanini MBM hevur. Við tí ber til at fáa samanberandi frágreiðingar yvir t.d. hvussu long tíð er ímillum at neytini kálva, hvussu nógv árskýrnar mjólka samanborið við miðalið í Føroyum, og sjálvandi yvirlit yvir hvussu nógv neytini hjá einstaka bóndanum mjólka.*

*Seyðabóndur mugu enn sjálvir skipa fyri at hava eina skráseting.*

## 2. Partur
## Treytir fyri at fáa stuðul eftir § 10a stk. 1 í lóg um Búnaðargrunn

§ 2 Stuðul kann játtast festi/-um, har festarin rekur vinnuligt virksemi á festinum/-unum sambært løgtingslóg um landsjørð.

*Stk. 2* Áðrenn stuðul eftir § 10a av festikontuni/-puljuni kann verða veittur festi/-um, verða møguligir pengar á kontuni fyri avloysing av biti og av festikontuni nýttir fyrst.

*Stk. 3* Fyri at fáa umsóknina um stuðul eftir § 10a viðgjørda skal festarin hava hildið sínar skyldur mótvegis grunninum.

*Stk. 4* Festarin skal hava ræðisrættindi á økinum, har íløgan verður gjørd, soleiðis at økið annaðhvørt er partur av festinum, ella festið hevur langtíðar leigusáttmála við eigaran/festaran um tað. Er talan um almenna jørð, skal sáttmálin eisini vera góðkendur av Búnaðarstovuni.

*Stk. 5* Verður søkt um stuðul til húsdýrabygning, skulu húsdýrini vera skrásett í hóskandi skráseting, sum grunnurin skilar sær rætt til innlit í. Er eingin skipað felags skráseting, kann grunnurin krevja, at festarin sjálvur skrásetur síni húsdýr nøktandi, sjá §1,litra h).

*Stk. 6* Grunnurin kann treyta stuðulin av, at aðrir viðkomandi myndugleikar góðkenna ætlanina s.s. Umhvørvisstovan, Landsdjóralæknin og/ella kommunali byggimyndugleikin.

*Stk. 7* Brúksskylda verður áløgd tilfeingi, sum verður stuðlað eftir § 10a. Stýrið kann eftir umsókn avtaka brúksskylduna, um umstøðurnar tala fyri tí.

## 3. Partur
## Viðgerð av umsóknum

§ 3. Grunnurin skal kanna, um treytirnar fyri at játta stuðul eru til staðar, og um allar viðkomandi upplýsingar eru fingnar til vega, m.a. við ástaðarsýni.

*Stk. 2* Grunnurin skal meta, um íløgu-, rakstrar- og tíðarætlanirnar eru fíggjarliga burðardyggar, og/ella um ætlanin kann gerast bíligari.

*Stk. 3* Á hesum grundarlagnum ger stjórin eina samlaða meting og eitt tilmæli um møguliga fígging.

## 4. Partur
## Niðurskriving og gjald av saldu

§ 4 Stuðlin eftir § 10a verður niðurskrivaður linjurætt yvir 25 ár. Um íløgan verður nýtt samsvarandi stuðulsjáttanini, heldur niðurskrivingin óbrotin fram aftaná møguligt festaraskifti. Steðgar virksemið, íløgan varð ætlað til, kann Búnaðargrunnurin krevja ikki niðurskrivaðan stuðul rindaðan aftur í grunnin.

## 5. Partur
## Velting og vegir

§ 5 Við veg verður at skilja vegur egnaður til trakktor við viðkomandi arbeiðsamboðum at koyra eftir uttan trupulleikar.

*Stk. 2* Íbinding í almennan veg skal góðkennast av viðkomandi myndugleikum, áðrenn stuðul eftir § 10a verður útgoldin.

*Stk. 3* Stuðul eftir § 10a verður latin fyri í mesta lagi 200 metur av vegi/ha av bøi, sum er minst 3 m breiður, 300 kr./m. Um tilfar til vegagerð ikki fæst úr lendinum, verður latið upp til í mesta lagi 500 kr./m í stuðli. Av vegnum kunnu við serligum loyvi í mesta lagi 50 m/ha vera til veg til bøin/ætlaða bøin.

*Stk. 4* Stýrið kann í heilt serligum førum víkja frá ásetingunum í stk. 3.

*Stk. 5* Vegir, sum eru gjørdir við stuðli av festikontu, kunnu verða nýttir av øðrum jarðareigarum og/ella festarum, sum eiga/hava í festi jørð, sum liggur uppat vegnum, sjálvt um viðkomandi ikki átti part í íløgunum av vegnum.

*Stk. 6* Festari við mjólkneytum og við tilsvarandi viðsetu kann við heimild í § 10a í lógini fáa stuðul til at velta úr nýggjum til hann hevur ræðisrættindi á 1,00 ha av bøi fyri hvørjar 8.403,4 litur mjólkarkvotu. (*árskúgv sum mjólkar 9.000 litur 4% mjólk/árið við viðsetu klárar at eta 30 $m^3$ av súrhoyggi, bøurin gevur 3.500 FE av súrhoyggi/ha, 800 kg súrhoyggj/$m^3$, 6,4 kg súrhoyggi/FE og 1,5 kg turrevni súrhoyggj/FE. Tøl ásett við avtalu við Búnaðarstovuna*).

*Stk. 7* Festari, sum hevur seyð, kann við heimild í § 10a fáa stuðul til at velta úr nýggjum, til hann í mesta lagi hevur ræðisrættindi á 0,03 ha av bøi fyri hvønn áseyð hann hevur um veturin mett eftir Taxationsprotokollini frá 1873. Hetta um áseyðatalið ikki er lækkað og treytað av, at á festinum eru góðar og høgligar umstøður at herberga turra/súra hoynum. Kemur víddin uppum 0,012 ha/áseyð, skal festarin kunna visa á seyðahús, hann hevur ræðisrættindi á, og sum heldur § 9 í reglugerð fyri § 10a og 10b at hava seyðin í eins og umstøður at geva. *(0,6 fe/dg, 0,85 fóðurvirkni og 150 dagar: 0,03 ha/áseyð = 0,6/0,85*150 og 60 dg 0,0121 ha/áseyð = 0,6/0,85*150).*

Fyri hvønn brundseyðin/hvørjar 20 áseyðir verður mesta bøvídd økt við 0,04 ha. Brundseyðatalið verður rundað upp, tá desimalurin er 0,5 ella størri. (*0,6 fe/dg/0,85 fóðurvirkni *180 dagar/3.500 fe/ha= 0,04 ha/áseyð*).

**§ 6** Festari, sum hevur nokk av bøi til egin húsdýr eftir § 5, stk 6 og 7, kann fáa tilsøgn um stuðul til at velta úr nýggjum og til vegagerð í hesum sambandi eftir § 5 stk. 3, um hann hevur sáttmála samsvarandi § 2 stk. 4 við annan festara/jarðareigara, sum kann ávísa tørv eftir § 5 stk. 6 og 7. Frástøðan millum bøin og festið, sum hevur tørv á hoyggi, skal vera hóskilig.

**§ 7** Tá í § 10a, stk. 1 í lógini verður skrivað "búnaðarjørð", skal tað skiljast sum bøur og/ella lendi at velta upp úr nýggjum:

a. Ábøtur/umvæling: Tá bøur upprunaliga veltur til at verða arbeiddur við smærri og léttari amboðum skal riggast til størri nútíðar amboð, ella íkomnir blotar skulu fáast burtur ella annað. Grunnurin metir í hvørjum einstøkum føri um vídd og hvussu stuðulin skal verða. Er talan um at grunnvelta stykki/part av stykki kann stuðulin verða sum fyri nývelting. Er talan um léttari umgrevstur kann talan verða um eitt minni gjald fyri hvønn fermeturin. Í hvørjum einstøkum føri metir grunnurin um vídd og stuðul.

b. Velting: Tá bøur verður veltur til gras, epli, røtur ella aðra nyttugrøði. Stuðul verður bert latin í serligum førum, t.d. tá í samstarvi við viðkomandi fakfólk/vísindastovn verða gjørd/-ar roynd/-ir við nýggjari útgerð, nýggjum veltingarháttum, nýggjari avgrøði ella øðrum, sum grunnurin metir kann menna landbúnaðin. Grunnurin metir í hvørjum einstøkum føri um stuðul.

c. "Nýdyrking": tá lendi innan- og/ella uttangarðs, sum ongantíð hevur verið velt, verður umgrivið, rutt fyri grót, slættað og lagt í teigar til at sáða grasfræ í, seta niður epli í, sáða róta- ella annað fræ í. Festarin skal vísa á stráfóðurtørv (§ 5 stk. 6 og 7) og annan avleiddan íløgutørv, t.d. køst, pláss til hoyggj og/ella básapláss. Økið at velta úr nýggjum skal liggja hóskandi fyri í mun til fjós, seyðahús og hoyløðu ella súrhoysbrunnar/flatbrunnar, og skal vera egnað at velta upp úr nýggjum og at verða arbeitt við hóskandi amboðum. Møguligur stuðul verður roknaður eftir vídd, í mesta lagi 12 kr./$m^2$, tá talan er um velting við opnum veitum, og 15 kr./$m^2$ tá talan er um afturlagdar veitir.

d. Um ivamál eru, um talan er um opnar ella afturlagdar veitir, ger veltitoymið innstilling til stýrið, sum tekur endaliga avgerð.

*Stk. 2* Ikki er loyvt at lata seyð ella onnur húsdýr beita velta "búnaðarjørð", sum hevur fingið stuðul sambært § 7 stk. 1. Verður tað gjørt, verður tað javnsett við misrøkt av stuðl-

inum eftir § 10a, og kann grunnurin krevja aftur ikki niðurskrivaðan stuðul. Henda regla er ikki galdandi, tá annar hagi enn hagin hjá festinum, sum hevur fingið stuðul eftir § 10a í lógini, eigur vetrarbitið á økinum.

## 6. Partur

## Fjós, seyðahús og rættir

**§ 8** Nútímans leysgongufjós til mjólkneyt við køsti og súrhoysbrunnum/flatbrunnum verða stuðlað við í mesta lagi 60.000 kr./liggibás til mjólkneyt, tó ongantíð meira enn 50% av byggikostnaðinum.

*Stk.* 2 Um- og útbyggingar til meira nútímans mjólkneytafjós verða stuðlaðar við í mesta lagi 50% av byggikostnaðinum. Grunnurin metir í hvørjum einstøkum føri um upphæddina.

*Stk. 3* Umframt treytirnar vístar á heimasíðu grunsins, www.bg.fo, eru treytirnar fyri stuðli, at:

- Byggingin og innrættingin skal í best møguligan mun tryggja neytunum góðar liviumstøður.
- Í mun til neytatal í fjósi skulu vera krubbur/bing til kálvsjúkar kýr, sjúkar kýr, umstøður at mjólka sjúkum neytum og onnur tilsvarandi pláss, t.d. til deyð neyt.
- Krubbur/bing við liggibásum skulu vera til ungneyt.
- Nøktandi umstøður eru til kálvar *(0,75 ungneyt + kálvar/vaksi mjólkneyt)*.
- Køsturin, leysgongufjós, minst 2,87 m³/1.000 l kvotu, (*8 mðr og 9.000 l/árskúgv*).
- " siðbundið básafjós, minst 2,24 m³/1.000 l kvotu, ( - " - ).

*Stk. 4* Bygging av súrhoysbrunni/-um, flatbrunni/-um, inniloking av flatbrunni/-um og/ella køsti, verður stuðlað við í mesta lagi 40% av byggikostnaðinum. Súrhoysbrunnarnir kunnu í mesta lagi verða 28 m³/8.403,4 kvotulitrar, og flatbrunnarnir 13 m²/8.403,4 kvotu-litrar + plattur rundanum, 3 m breiður *(bg.j.nr.16/00033-2)* Grunnurin metir í hvørjum einstøkum føri um stuðulin.

*Stk 5* Stuðul kann verða latin upp til 50 m av vegi til fjósið, í mesta lagi 300 kr./m.

*Stk. 6* Stýrið kann í heilt serligum førum víkja frá ásetingunum í hesi grein.

**§ 9** Nýggj nútímans seyðahús við køsti verða stuðlað í mesta lagi við 50% av byggi-kostnaðinum, tó í mesta lagi við 4.000 kr/áseyð. Um- og útbyggingar til meira nútímans seyðahús verða stuðlað við í mesta lagi 50% av byggikostnaðinum. Grunnurin metir í hvørjum einstøkum føri um stuðulin.

*Stk.* 2 Umframt treytirnar vístar á heimasíðu grunsins, www.bg.fo, eru treytirnar fyri stuðli, at seyðahús skal verða bygt/um- og/ella útbygt og innrættað soleiðis, at

- tað í framtíðini uttan stórvegis broytingar skal kunna verða partur av størri seyðahúsi egnað at hava allan seyðin inni í fyri veturin,
- hvør áseyður hevur minst 1 m² av fríum pláss at liggja á og helst liggipláss fram við brósti ella veggi,
- um ikki víst verður á aðra loysn, sum Búnaðargrunnurin kann góðtaka, skal vera minst 1 metur djúpur køstur millum undirkant á undirsyll/undirsløgum og miðal hædd á køstabotni,
- minst helvtin av gólvinum í krubbunum/bingunum skal vera annað enn tambað jarn, t.d. træ, plast ella annað egnað tilfar,
- seyðahúsið skal helst standa við koyriveg so komandi er til húsið við hóskandi akfari/traktori við flutnings- ella tøðvogni, lagaligt er at flyta millum akfar og seyðahús

seyð, gras/hoyggj, kraftfóður ella annað viðkomandi og at fáa tøðini úr køstinum við tíðarhóskandi flutningsamboðum,

- hoyløða/súrhoysbrunnar/flatbrunnur/-ar skal/skulu kunna verða bygd/bygdir afturat seyðahúsinum til vetrarfóður til allan seyðin.

*Stk. 3* Undantak kann í heilt serligum førum verða givið frá § 9 stk. 2.

*Stk. 4* Hoyløður, súrhoysbrunnar verða stuðlaðar við í mesta lagi við 40% av byggikostnaðinum. Grunnurin metir í hvørjum einstøkum føri um stuðulin.

*Stk .5* Í mesta lagi 45 m² av túni til akfør at standa á, kann verða roknaðir sum partur av seyðahúsinum.

*Stk. 6* Stuðul kann verða latin fyri upp til 50 m av vegi til seyðahús, í mesta lagi 300 kr./m.

*Stk. 7* Stýrið kann í heilt serligum førum víkja frá ásetingunum í hesi grein.

**§ 10**

a) Bert hagar, sum hava egið matr. nr., kunnu fáa stuðul eftir § 10a til nýggja rætt.

b) Um stødd og onnur krøv um rættina (plásskrøv m²/áseyð, hædd á garði v.m.), sjá heimasíðuna www.bg.fo.

c) Rætt til 1 haga verður í mesta lagið stuðlað við 20% av íløgukostnaðinum, til 2 hagar við 35% og til 3 og fleiri hagar við 50% av íløgukostnaðinum, sum í mesta lagi má vera **750 kr./m²**.

d) Í mesta lagi 45 m² av túni til akfør at standa á, kunnu verða roknaðir sum partur av rættini, roknað við 1.000 kr/m².

*Stk. 2* Stuðul kann verða latin upp til 50 m av vegi til rættina, í mesta lagi 300 kr./m.

*Stk. 3* Stýrið kann í heilt serligum førum víkja frá ásetingunum í hesi grein.

## 7. Partur
## Mennandi ætlanir, § 10b stk. 1 í lógini

**§ 11** Lán og stuðul eftir § 10b kann verða játtaður festarum og øðrum av felags festipulju til nýskapandi tiltøk og verkætlanir, sum stýrið metir kunnu vera við til at menna vinnumøguleikarnar innan landbúnaðin.

*Stk. 2* Um ivamál eru, skilar grunnurin sær rætt til, at biðja um at fáa uttanveltaða/-ar fakliga/-ar metingar gjørdar av landbúnaðarfrøðingi, verkfrøðingi ella øðrum viðkomandi serfrøðingi. Útreiðslur av møguligari uttanhýsis meting verða goldnar av møguligari játtan.

*Stk. 3* Grunnurin treytar stuðulin eftir § 10b av, at aðrir viðkomandi myndugleikar hava góðkent ætlanina, t.d. Umhvørvisstovan, Friðingarnevndin og/ella kommunalu byggimyndug- leikarnir.

**§ 12** Til umsóknir, sum vísa til § 10b, stk. 1, tekur stýrið støðu til, um:

i. fíggingin skal verða stuðul og
ii. krevjast skal niðurskriving ella ikki og
iii. hvussu grunnurin verður kunnaður um úrslitið, t.d. við skrivligari frágreiðing, roknskapi, fyrilestri/-um e.a.

## 8. Partur

Soleiðis samtykt á stýrisfundi hjá Búnaðargrunninum á fundi 14.11.2019

*Símun Gullaksen, form.* *Una Joensen, næstform.* *Rani Slættanes*

*Niels Winther Poulsen* *Birta Biskopstø*

Landsstýrismaðurin í landbúnaðarmálum varð kunnaður um innanhýsis reglugerðina og um broytingarnar 14.11.2019.

Í Tórshavn 14.11.2019

*Regin I. Jakobsen, stjóri*